Høgni breyt beinið

Hóast EB/Streymur fegnaðist um stigini sunnudagin, so vóru eisini rivur í gleðini. Mikkjal Thomassen hevur verið úti í tríggjar vikur, og tað vísti seg skjótt, at hælsinan ikki enn er til reiðar til Formula-fótbólt. Og hjá Høgna Zachariassen endaði dysturin heilt keðiliga. Einsamallur uttan mótstøðumann í nær námind traðkaði hann púrasta skeivt, og úrslitið var eitt brot í einum beini í fótinum. So uttan iva ganga nakrar vikur, áðrenn hann aftur kann venja.

Helt í 451 minuttir

Hóast HB hevur havt sínar trupulleikar í álopspartinum, so hevur verjan staðið seg heilt væl. Undan dystinum í Streymneis hevði Tróndur Vatnhamar soleiðis staðið 445 "reinar" minuttir í HB-málinum. Men tá hevði HB so heldur ikki spælt móti mest skorandi liðnum í deildini. Og tað gekk heldur ikki long tíð, áðrenn EB/Streymur setti hol á. Hetta hendi longu eftir seks minuttum, og gjørdist talan soleiðis um 451 málleysar minuttir hjá HB í verjupartinum.

EB/Streymur-HB 2-1 (1-1):

Málini telja

EB/S

HB

Gamli sannleikin um, at eingin vinnur nakað uttan eitt sindur av hepni slapp at standa sína roynd, tá EB/Streymur fekk trý stig sunnudagin, hóast teir í longum løtum vóru sera hart kroystir av HB. Men hepni kemur sjáldan av sær sjálvum

FÓTBÓLTUR

Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Tað mundi kennast sum eitt stórt paradoks í HB-leguni sunnudagin. Seinasta mánaðin hevur spælið hjá FM-biðlunum verið meira enn eitt sindur trilvand, men tann knútin tóktist sigurin á NSÍ at hava loyst.

Ístaðin spældi HB sín helst besta dyst hetta kappingarárið, tá teir vitjaðu við Margáir, men fyri fyrstu ferð í ár kom einki stig við heimaftur.

Steðgaðu eftir málið

Skal rætt vera rætt, so vóru heimamenninir tó ikki heilt fyri ongum. Fyrsta lítla korterið á dystinum prógvaðu teir veruliga, hví teir á stigatalvuni liggja sum reitt. Á miðvøllinum høvdu Bárður Olsen og Mikkjal Thomassen tamarhald á tí mesta, og so gekk ofta skjótt, tá bólturin varð spældur upp í borðunum.

Leiðslumálið var eisini ein sonn perla, tá HB-verjan varð tagað sundur av 2-3 skjótum sendingum, áðrenn Hans Pauli Samuelsen, sum sjálvur var miðdepil í álopinum, smekkaði flatt av brotsteigarmarkinum.

Trupulleikin í spælinum hjá EB/Streymi var kanska, at teir so tíðliga komu framum. Eftir leiðslumálið løgdu teir seg longur aftur á vøllin. Og tá hælsinan hjá Mikkjali Thomassen skjótt mátti geva upp, mistu teir eisini takið á miðvøllinum.

Og so kom HB veruliga ígongd. Fyrstu løtuna var talan tó um tannleyst trýst, har spælið í alt ov stóra mun varð trokað eftir miðásini, og har heimaverjan tí ikki hevði teir heilt stóru trupulleikarnar.

Men spakuliga komu eisini nakrir bóltar, ið vórðu spældir djúpt, og tá gjørdist tað heilt skjótt vandamikið. Serliga hevði Andrew av Fløtum sínar møguleikar, men nærri enn einum dundurskotið á stólpan kom hann tó ikki fyri steðgin.

Í hinum endanum royndi EB/Streymur at dúva upp á kontra, og løtuna undan steðginum riggaði hetta væl. Ikki minst, tá talan var um trífaldan møguleika.

Leikaði hart á

Og dystargongdin helt fram eftir steðgin. Kanska við undantaki av, at EBS/treymur tók seg enn longur aftur á vøllin. Men longu eftir 10 minuttum gekk galið. Jákup á Bog varð sendur avstað í vinstru, og tá hann legði út frá til Andrew, ivaðist maðurin við 10-talinum ikki, áðrenn hann smekkaði bóltin í netið.

Og HB var á ongan hátt nøgt við javnleikin. Takið og trýstið á EB/Streymi varð als ikki slept. Men hinvegin raknaði EB/Streymur eisini av álvara við. Og við kvikum spælið skaptu teir fleiri ferðir heilt álvarsligan vanda framman fyri HB-málið.

Hjá HB var tað serliga ein fragd at síggja, hvussu Christian Høgni Jacobsen fleiri ferðir skræddi djúpar foyrur í verjupartin hjá EB/Streymi, men hóast vandastøðurnar vóru nógvar, so eydnaðist ongan tíð hjá HB at fáa avgerandi fótin inn í einum dysti, har liðini vístu, hví júst tey eru tey fremstu

Eitt spæl um mál

Deyðbóltarnir hava verið eitt tað vandamiklasta vápnið hjá EB/Streymi í ár, og tað lá kanska í lutini, at skuldi heimaliðið vinna, so var ein slíkur neyðugur.

Tað eydnaðist eisini innskifta Hanus Eliasen at fáa nøkur fríspørk í borðinum. Kanska var tað tilvitaður partur av innskiftinum, at tað skuldi dyrgjast eftir júst hesum, og í yvirtíðini gav hetta eisini úrslit. Eftir stutt fríspark til Levi Hanssen varð bólturin lyftur inn í brotsteigin, og so prógvaði Arnbjørn Hansen, at hann hevur betri máltev enn teir flestu.

Rættvíst mundi tað ikki kennast hjá HB. Og teir høvdu alla orsøk at vera misnøgdir. Men fyrst og fremst mundu teir iðra seg um egnan vantandi effektivitet.

Tað kundi EB/Streymur hinvegin ikki gremja seg um. Men fótbóltur er nú eina ferð eitt spæl um mál. Tann, sum skjýtur tey flestu av hesum, vinnur dystin. Og so ræður um at hava hvassar menn í fremstu rød. Í so máta hevur EB/Streymur helst tann hvassasta í landinum.

Og so slepst illa undan at rósa ungu monnunum hjá oddaliðnum. Hóast ungan haldur, so teljast Bárður Olsen, Marni Djurhuus og Hans Pauli Samuelsen longu millum veteranarnar. Men líka so imponerandi er tað at síggja næsta ættarliðið av spælarum, sum veruliga hava tikið kjansin. Tá hugsað verður um, at oddaliðið stóran part av árinum hevur verið royndar og berandi kreftir fyriuttan, er oddasessurin eitt sjónligt prógv um, at grundarlagið er fyri tí heilt stóra í felagnum.

Liðið vinnur

Við sínum máli í yvirtíðini bjargaði Arnbjørn T. Hansen trý virðismikil sti gtil EB/Streym, sum soleiðis skræddi seg púrasta leyst í oddinum.

Umframt stigunum bjargaði Arnbjørn eisini sínum egnu hagtølum, sum framvegis sýna, at vandamikli áleyparin skorar eitt mál fyri hvønn dystin, men hetta var ikki nakað, sum hann hevði hug at leggja stórvegis dent á eftir dystin.

- Fótbóltur er nú einaferð so, at tað er eitt lið, sum spælir. Onkur skal so skjóta málini, og tann leiklutin havi eg havt nakrar ferðir. Meira enn tað liggur ikki í tí, sigur hann.

Men tað skerst ikki burtur, at hann var fegin um málið og ikki minst stigini, sum hetta gav. Ikki minst tí hann helt, at HB var betri á degnum.

- Teir vóru betri í dag, men mann má vera heppin viðhvørt, og tað var vóru vit kanska í dag. Teir spældu væl, og teir fluttu seg væl, so tað var trupult hjá okkum. Hinvegin eru vit enn á odda, og tey stigini eru altíð góð at hava, segði Arnbjørn eftir dystin.

Tá seinasti bólturin varð sendur inn fyri HB-málið, vísti Arnbjørn T. Hansen enn einaferð, hví hann verður mettur sum vandamiklasti áleyparin í landinum

Mynd: Sofus D. Johannesen

Høvdu uppiborið meira

Fróði Benjaminsen var alt annað enn fegin um, at hann og liðfelagarnir ikki fingu meira enn tað sama burtur úr dystinum við Margáir sunnudagin.

- Vit eru so klárt betra liðið í dag. Og at vit kortini tapa dystin 2-1, er heilt ótrúligt.

Og tit eru fimm stig aftanfyri. Kann tað ikki vera tungt at heinta aftur?

- Sjálvandi. Fimm stig, tað eru tveir dystir, so vit mugu bara arbeiða hart, um vit skulu vinna tað aftur. Hinvegin er nógv positivt, sum vit kunnu taka við okkum úr dystinum, og so mugu vit bara brúka tað positivt, heldur Fróði Benjaminsen.